# NÚ BYRJAR FØROYSKI VIRÐISBRÆVAMARKNAÐURIN

**Mikudagin 15. juni, verður fyrsta føroyska fyritøkan skrásett á Virðisbrævamarknaði Føroya. Tað er Atlantic Petroleum, ið letur seg skráseta og harvið er sjøtul settur á søluna av føroyskum partabrøvum á Virðisbrævamarknaði Føroya.**

Síðan stovnan í ár 2000, hevur Virðisbrævamarknaður Føroya (VMF) skrásett fimm føroyskar lánsbrævarøðir við Føroya Landsstýri sum útgevara. Nú er tíðin komin til at kunna bjóða partabrøv og harvið er ein veruligur partabrævamarknaður veruleiki í Føroyum.

**Nevnd og samstarv**

Partafelagið Virðisbrævamarknaður Føroya (VMF) varð stovnað 7. november 2000. Útgevarar, íleggjarar, meklarar og myndugleikar stovnaðu felagið. Í nevndini í VMF eru fimm fólk. Hon verður vald soleiðis, at teir fýra stovnararnir, velja hvør sítt umboð. Landsbanki Føroya stendur fyri fyrisiting felagsins.

VMF virkar í samstarvi við íslendska virðisbrævamarknaðin, ICEX. Tøkniliga verða føroysku virðisbrøvini skrásett í donskum krónum á íslendska marknaðinum (ICEX) og útgivin á danska virðisbrævasentralinum (VP).

**Úrtøka fyri allar Føroyar**

Endamálið við VMF er at reka ein virðisbrævamarknað fyri føroysk virðisbrøv. Málið er at skapa meirvirði fyri allar áhugabólkarnar í felagnum og føroyska samfelagið sum heild.

Útgevarar fáa lættari hendur á kapitali og betri møguleikar fyri at vaksa. Eisini verður møguligt hjá nýggjum vinnum at fáa kapital.

Hetta hevur stóran týdning, tá føroyskar fyritøkur skulu mennast bæði heima og uttanlands.

Íleggjarar fáa við marknaðinum høvi til at gera íløgur í føroyskt vinnulív á ein tryggan hátt. Eftirlønaruppsparingin fer at økjast munandi komandi árini, og uttan, at føroyskar fyritøkur skráseta seg á virðisbrævamarknaði verður als ikki møguligt, at hesin peningur kemur føroyska vinnulívinum til góðar. Higartil er nógv av øðrum íløgukapitali eisini farin av landinum, tí ov lítið hevur verið, at sett pening í her heima.

**Bæði stór og smá**

Føroyskar fyritøkur, ið skráseta seg á VMF, kunnu skráseta seg bæði á einum virðisbrævabørsi, ið setir fyritøkum strong krøv, og á einum løggildum marknaði, ið setir fyritøkum linari krøv.

Ávísir størri íleggjarar, eitt nú eftirlønargrunnar, seta sum krav fyri at keypa partabrøv, at fyritøkan er skrásett á virðisbrævabørsi, og eru størri fyritøkur tí sinnaðar at ganga undir strong krøv fyri at verða skrásettar á einum virðisbrævabørsi.

Smærri fyritøkur kunnu hava tað trupult við at ganga strongu krøvunum á møti, og kunnu í staðin skráseta seg á tí løggilda marknaðinum, ið gevur atgongd til somu fyrimunir sum virðisbrævabørsurin, men har fyritøkurnar tó frásiga sær ein part av størru íleggjarunum.

**Keyp og søla**

Partabrøv og lánsbrøv verða seld og keypt gjøgnum meklarar, ið veita holla ráðgeving í sambandi við íløgur. Hevur tú áhuga í at keypa føroysk virðisbrøv, ert tú vælkomin at venda tær til ein av niðanfyristandandi meklarum.

· Føroya Banki
· Føroya Sparikassi
· Kaupthing Virðisbrævameklarafelag
· Norðoya Sparikassi
· Suðuroyar Sparikassi

Í løtuni eru fylgjandi virðisbrøv skrásett á VMF við fylgjandi navnavirði:

Lánsbrøv
350 mió. kr. ganga út í 2005
375 mió. kr. ganga út í 2006
775 mió. kr. ganga út í 2008
430 mió. kr. ganga út í 2010

15. juni 2005 verða partabrøv hjá Atlantic Petroleum skrásett við marknaðarvirði á 196 mió. kr. (við kurs 265, sum var prísurin pr. 31.12.04) Atlantic Petroleum varð stovnað í februar 1998, og hevur um 3.000 føroyskar íleggjarar. Meira kunning um felagið fæst á www.petroleum.fo.

Føroysku virðisbrøvini eru øll savnaði á føroysku heimasíðuni - www.vmf.fo - har møguleiki m.a. er at fylgja við í prísinum á virðisbrøvunum, fáa dagførdar upplýsingar og fáa kunning um Virðisbrævamarknað Føroya.

VMF VIRÐISBRÆVAMARKNAÐUR FØROYA
THE FAROESE SECURITIES MARKET

VMF · GONGIN · POSTBOKS 229 · FO 110 TÓRSHAVN · TEL +298 31 83 05 · WWW.VMF.FO

TEAM85